

## Kom heim at avgera

Rasmus Nolsøe, sum í ár hevur lagt upp til nógv mál hjá HB í góðum deyðbóltsstøðum, hevði ikki verið við teir síðstu dystirnar, men var við aftur í gjár, tá hann kom beint inn á liðið og spældi allar 90 minuttirnar í miðverjuni.
– Hetta er heilt fantastiskt. Eg kom heim, fyri at vit skuldu fáa tað avgjørt, og tað gjørdu vit. Spælið hevur kanska ikki altíð verið so flott og vit hava onkuntíð verið hepnir, men tann, sum liggur ovast, hevur altíð uppiborið tað, segði Rasmus. – Hetta við gummibeinunum er kanska nakað sálarligt, ið ávirkar, men tað var deiligt at koma heim at hjálpa liðnum. Vit merktu kanska ikki, at vit vóru á odda, og tí slappaðu vit eitt sindur ov nógv av.

**hil**



Mynd: Jens Kr. Vang

# Deiligt at fáa hol á

Leygardagin kundi Hans á Lag halda sín 35 ára føðingardag, og sunnudagin var hann við málinum til 1-0 ein stór orsøk til, at hann saman við liðfeløgunum og øllum hinum í HB kundi feira føroyameistaraheitið 2009.

– Tað var øgiliga deiligt at fáa hol á beinanvegin. Vit vóru væl fyri og vóru samdir um, at í dag skuldi tað verða. Nú eru trý ár, síðani at vit vunnu síðst, so tað var øgiliga deiligt at vinna aftur, segði Hans á Lag, ið samstundis harmaðist um, at sigurin hevði við sær, at KÍ helst missir sítt pláss í bestu deildini.

– Ja, tað er eitt sindur hugstoytt, at vit so skulu siga farvæl við KÍ, men klaksvíkingar skulu bara koyra á, so koma teir aftur.

**hil**

# Fyrsta meistaraheitið

Ein av yngru spælarunum hjá HB, sum tað nógva av hesum kappingarárinum hevur staðið sterkur í myndini, er argjamaðurin, Røgvi Poulsen, sum í gjár eisini taldist millum málskjúttarnar, tá hann í fyrsta minutti av seinna hálvleiki skoraði til 4-0.

– Hetta er ein fantastiska deilig kensla, og hetta er eisini fyrsta føroyameistaraheiti í bestu deildini, sum eg havi verið við til at vunnið. Allir vóru tendraðir í dag, tí nú vildu vit vísa, at vit veruliga vóru besta liðið í Føroyum, eftir at tað hevði gingið so illa í síðstuni, segði Røgvi.

– Tá vit vóru á odda 4-0, føldi eg, at vit eisini vóru hesi fýra málini betri. Men so slakaðu vit kanska eitt sindur, so KÍ slapp inn og fekk skotið tvey mál. Men vit vunnu so.

**hil**

# Drúgt at bíða eftir

– Vit vóru góðir í dag, ja, snøgt sagt suverenir, og her vóru eingi gummibein at hóma í Gundadali, segði Páll Mohr Joensen eftir sigurin á KÍ, ið tryggjaði HB meistaraheitið.

– Vit hava havt eitt gott kappingarár. Kanska hava vit ikki altíð spælt so góðan fótbólt, men vit hava vunnið teir nógvu dystirnar, uttan nú í seinastuni. Hetta hevur verið drúgt at bíða eftir.

**hil**

# Fingu gullbein

Liðformaðurin hjá HB, Fróði Benjaminsen, ið sjálvur taldist millum málskjúttarnar ímóti KÍ, var ovurfegin eftir sigurin í gjár, tí tað gekk sum eftir ánni – í mun til síðstu dystirnar hjá liðnum.

– Eg haldi, at vit fingu okkum gullbein í staðin fyri gummibein. Vit vóru kanska ov langt fremstir, til at menn tóku tað nóg seriøst, men kanska hildu, at tað fór at ganga av sær sjálvum, segði hann.

– Men í dag vístu vit, hvat vit dugdu. Vit skuldu vinna dystin, og tað var tað, vit fóru eftir. Eisini kundu vit fegnast um, at spælið koyrdi væl hjá okkum.

**hil**



# Heilt fantastiskt

Poul Thomas Dam, ið millum annað legði upp til 2-0 málið hjá HB, var ovurfegin eftir dystin, tá vit fingu orðið á hann, so skjótt sum hann hevði fingið muss og klemm frá pápa sínum, Ova Dam.

– Tað var deiligt at fáa tað avgjørt nú, heilt fantastiskt. Nú hevur verið so nógv prát um gummibein og alt hatta har, so tað var ótrúliga deiligt at fáa tað yvirstaðið, segði Poul Thomas.

– Men eg má viðganga, at eg var eitt sindur nervøsur síðsta korterið. Tað helt allíkavæl hjá okkum, og tað er ein ordiliga deilig kensla. Eg var eisini við til at vinna meistaraheitið í 2006, men hetta er fyrsta árið, eg eri við allan vegin ígjøgnum og gerist meistari. Tað er heilt fantastiskt.

**hil**

# Fegin formaður

Millum tey mongu fegnu HB-fólkini, sum tustu inn á vøllin í Gundadali at fagna sínum meistarum seinnapartin í gjár, var formaðurin í HB, Niels Juel Arge, ið tóktist eitt sindur rørdur av hesum stóra degnum hjá Havnar Bóltfelag.

– Hetta er okkara tjúgunda meistaraheiti, og tað kennist sum nakað serligt. 20 er eitt tal, sum er eitt sindur magiskt. Tað er eitt sindur síðani, at vit yvirhálaðu KÍ í meistaraheitum, so vit nú hava 20 vunnið 20 meistaraheiti og 26 steypakappingar. Men vit steðga ikki her, segði HB-formaðurin, ið einki hevur ímóti at leita sær íblástur frá italska Juventus, tá blusurnar skulu pyntast næsta ár.

– Tá vit fyltu 100 ár, høvdu vit eitt serligt búmerki við 17 stjørnum, men nú kanska vit fara at markera hesi 20 meistaraheitini við tveimum stjørnum á bringuni – einari fyri hvørji 10 meistaraheiti.

**hil**